# BØNARLØTAN

**FEBRUAR** **2025** **40. árg.**

## *1. Leygardagur* *4. Mós. 8.1-26*




**TAILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**

Chiang Mai varð rakt av ógvisligastu vatnflóðini í søgu landsins. Við føroyskum stuðli og í samstarvi við 10 ymiskar samkomur hava vit hjálpt 100 húsarhaldum við at geva teimum tað, sum svarar til mat í ein mánað umframt nýggjar madrassur og teppir. Henda hjálpin hevur stóran týdning fyri tey neyðstøddu. Biðið fyri fólkinum her í Chiang Mai, nú tey royna at koma fyri seg aftur, og biðið fyri framhaldandi møguleikum at stuðla teimum – bæði praktiskt og andaliga.

**Anna og Hans Djurhuus**
Føroyskt møti verður 1. feb. kl. 19, í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2a í Aalborg. Vit luttaka á føroyska møtinum í Give Baptistkirke 15. feb. kl. 19 og á danska møtinum 16. feb. kl. 10. Biðið, at Harrin signar Orðið, ið verður talað.

**KRINGVARPIÐ**

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv........ kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv............ kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Sunnudagur* *Jóh. 8.1-30*




**OM, LOGOS HOPE, DOULOS HOPE, TeenStreet**
Frá fyrst í feb. verða Frida og Óli Gregersen fimm mánaðir á Reach skúlanum hjá OM í Suðurafrika, har eisini Tanja og Kurt Abrahams arbeiða. Hjalmar Gregersen hevur verið fimm mánaðir á Reach skúlanum í Onglandi og verður liðugur nú í februar. Logos Hope er í Karibiahavi. Elsa í Skorini fór umborð fyrst í jan. og verður við í tríggjar mánaðir. *Stórur tørvur á manning til skipini bæði*. Birita og John Timothy eru farin aftur til Japan, har tey nú skulu flyta úr Sapporo til Nanae. Tey eru spent um nýggja tíðarskeiðið.



**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 4, Boas 2**

**Susan og Øssur Berghamar**

## *3. Mánadagur* *4. Mós. 9.1-23*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Eg verði í Skotlandi í feb. til læknaviðtalur og arbeiði við umseting og málvísindaligum spurningum. Sue verður í Meksiko hesa tíðina. Biðið, at hon fær góð boð frá onkologinum. Kolossebr. er liðugt, men stavseting skal kannast, og bókaútgávan sniðgevast. Biðið fyri tilgongdini og umsetingararbeiðnum.

**ZAREPTA, Samkomulegur**

## *4. Týsdagur* *Jóh. 8.31-59*



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Lærutilfarið til Rómbr. er rættlisið, men skal tó gjøgnumgangast fleiri ferðir enn. Arbeiðið gongur væl. Bíbliuumsetarin frá Wycliffe Umsetarum arbeiðir framvegis við GT. Vit gleða okkum til, at kankanaey-fólkið fær alla Bíbliuna á sínum egna máli. Takk, at tit biðja fyri Liz. Hon gongur væl betur nú og hevur minni pínu. Biðið, at knæið lekist.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 16**



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**

**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 13**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 10, Lukas 4**

## *5. Mikudagur* *4. Mós. 10.1-17*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 15, Markus 12, Evita 9, Joy 8**



Góðar hendur hjálpa til. Fleiri familjur í samkomuni líða undir byrðini av rúsevnismisnýtslu – *biðið fyri teimum, tí Hann, sum í tykkum er, er størri enn hann, sum í heiminum er. 1. Jóh. 4,4.*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Biðið signing Guds yvir summarlegurnar – at børn og ung koma, at vit fáa trúgvandi starvsfólk, og at Harrin sendir alt, sum tørvar.

## *6. Hósdagur* *Mark. 1.1-20*

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 17, Lydia 14**

Claire: Eg eri takksom fyri møguleikan, eg fekk, at vegleiða ymiskar undirvísarar á ráðstevnuni síðstu vikurnar. 6-9. feb. tosi eg á enn eini ráðstevnu í Budapast. Mær tørvar vísdóm í arbeiðinum. Biðið, at verkstovan eydnast, um varðveitslu á ferðini, og at Harrin verður dýrmettur í øllum, ið eg geri.

**FØROYAR**
**Birita og Petur á Roykheyggi**
Takk, at tit minnast okkum í bøn og við stuðli. Petur hevur saman við øðrum vitjað samkomur kring landið seinnu helvt av jan. og heldur á í feb. Biðið, at Harrin talar.



**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**

## *7. Fríggjadagur* *Sálm. 34*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Biðið fyri samkomuni í Sorimi, at tey standa sterk í trúnni og halda seg til Orð Harrans. Leiðir Harrin okkum, so vitja vit har seinni í árinum. Missiónsstevnan Reach hjá NTM í Onglandi 28-30. mars verður nú fyrireikað. Minnist næmingarnar á skúlanum, sum teir lesa víðari.

## *8. Leygardagur* *4. Mós. 10.18-36*

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**
Nýggju luttakararnir byrja á Reach skúlanum 8. feb. Vit ætla at vitja í Føroyum í juni-juli. Hanna má fáa pass, mítt skal endurnýggjast, og Kurt má fáa visum. Biðið, at alt hetta gongur væl.



## *9. Sunnudagur* *Mark. 1.21-45*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 7**




Fleiri nýggj, eini fýra-fimm, vilja tosa um dóp. Hetta er gleðiligt, og vit fara í næstum at hava samrøður við tey.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 15, Nana 13, Louie 11, Rio 5**

Vit umhugsa at byrja møti á enskum. Okkum tørvar vísdóm og Guds leiðslu.

## *10. Mánadagur* *4. Mós. 11.1-20*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**

Okkum tørvar nýggjan elsta, nú ein skjótt flytur av landinum. Vit eru takksom fyri tveir nýggjar mannligar sunnudagsskúlalærarar, sum kunnu vera fyrimynd hjá nógvu ungu dreingjunum í samkomuni. Biðið, at vit hvønn sunnudag boða evangeliið greitt.

**Atlantic Mission, Juvel II**

**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 9, Natan 6**



## *11. Týsdagur* *Mark. 2.1-28*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Vit fara nú at arbeiða í Føroyum í hølum, sum vit hava fingið í Fuglafirði frá 1. apr. Jens Pauli í Dali flytur til Føroya í hesum sambandi. Minnist hann á serligan hátt. Takk fyri forbøn.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
*Kirken på gaden* er ein týðandi táttur í kristniboðanini í Odense. Vit hava serliga gott samband við heilt ung, konfirmantar og eitt sindur uppeftir. Latið okkum kenna, at tað frammanundan er lagt til ræettis, hvør fer ein túr í býin.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Mikudagur* *4. Mós. 11.21-35*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**
Bíblian á saafimáli verður prentað í Niðurlondum. Perman verður prýdd við bæði latínskum og arabiskum bókstavum við heitinum *Boðanin um frelsu*. Eitt minni upplag í stórari stødd verður prentað til samkomur og átrúnaðarlig savningarstøð. Biðið fyri hesum arbeiðnum.

## *13. Hósdagur* *Mark. 3.1-19*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Biðið, at Harrin, sum sendi út lærisveinarnar *tveir og tveir, Mark. 6.7*,

skal senda *tveir Timoteusar, 2. Tim. 2.2,* til verk Sítt í Suður-Grønlandi.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Fríggjadagur* *Sálm. 35*



**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Bið fyri Stevn, nú vit eru í holt við at gera fleiri programm og arbeiða við eini enskari útgávu. Av tekniskum orsøkum eru vit aftanfyri. Bið fyri samtalum, hirðatænastu og møtum. Bið fyri ætlanum fyri árið í sambandi við útheimin.

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**
Alsamt fleiri børn koma trúfast til barnamøtið. Biðið fyri teimum og familjum teirra. Fleiri umvælingar umborð á Immanuel mugu gerast, áðrenn hann skal á sjógv aftur í apríl. Tørvur er á hjálp úr Føroyum. Áhugað kunnu ringja til Marcus á +299 486448.



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

*Í dag fyllir Aron Joensen 13 ár

## *15. Leygardagur* *4. Mós. 12.1-16*



### VENESUELA, Puerto Ordaz
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

Tvær familjur, ið hava lært á bíbliuskúlanum, fara inn í ættarbólkin at virka. Samstundis fer skúlin at mangla lærarar. Nurimar hjálpir Shi-toyminum at gera stavrað til hendan ættarbólkin. Tvey sett av internetútgerð verða send inn til Yanomami-samkomuna, soleiðis at samkoman nú á trimum plássum aftur kann fáa góða bíbliulæru.

*Í dag fyllir Rebekah Niclasen 17 ár

### DANMARK, Hirtshals, Malta
### Ansa og Arnold Mortensen
### Ewelina 15

Takk fyri bønir í farna árinum. Ungdómsmøtini halda fram og eru nú hvørt fríggjakv. og ikki bert annaðhvørt. Biðið fyri teimum ungu, ið koma.

## *16. Sunnudagur* *Mark. 3.20-35*

### INDONESIA
### Krissy og Daniel Hansen
### Zephaniah 4, Selah Rose 2

Báðar familjurnar, sum vit hava samstarvað við, fara nú úr Asmatarbeiðnum. Sostatt verða vit einsamøll um at tæna asmat-fólkinum bert hálvt ár eftir, at vit fluttu inn í bygdina. Tað er óvist, um vit halda fram einsamøll, um onnur koma til, ella um eisini vit skulu fara í aðra tænastu. Biðið, at Gud gevur vísdóm og leiðir.

**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 12, Petra 11**



## *17. Mánadagur* — *4. Mós. 13.1-33*

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Arbeiði okkara er krevjandi, og okkum tørvar styrki og treyst. Vit takka fyri farna árið og síggja fram til, hvat ið Gud gevur okkum í 2025. Biðið eisini fyri børnum okkara – Lydia og Dan í Barcelona, Sonja í Manchester, og Karina og Tim her í Írlandi – fyri teirra arbeiði, skúlagongd og avgerðunum, ið tey taka.

## *18. Týsdagur* — *Mark. 4.1-20*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 12, Emma 8**



Samkomuelstin Michele misti konu sína í nov. og flytur tí til Norðuritalia. Tað merkir, at Regin nú røkir elstatænastuna í samkomuni einsamallur. Hann arbeiðir við at upplæra nýggjar elstar og samkomutænarar. Biðið um vísdóm.

## *19. Mikudagur* *4. Mós. 14.1-19*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Síðani seinast í des. eru uml. 40 trúboðarar, ofta fólk, ið hava verið 10-15 ár í landinum, útvístir úr Turkalandi. Vit kenna ikki orsøkina. Teirra millum eru samkomuleiðarar og familjur, ið rokna Turkaland sum sítt heimland. Biðið fyri teimum. Kortini hevur gingið væl við bíbliubrævskeiðunum, men teimum tørvar framhaldandi fíggjarligan stuðul.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

## *20. Hósdagur* *Mark. 4.21-41*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 7, Timon 5, Manuel 1, Salome 1**

Vit fara at menna lesiførleikaskeið fyri kovol-fólkið, og tveir ráðgevarar koma higar í tvær vikur at hjálpa okkum við hesum. Ættarfólk hjálpa okkum at savna einfaldar søgur at brúka til tey, sum læra at lesa fyri fyrstu ferð. Fólkið gleðir seg. Biðið, at kovol-fólkið skjótt lærir at lesa og skriva á egna máli sínum.

## *21. Fríggjadagur* *Sálm. 36*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 11, Abigail 6**

Takkað verið fíggjarliga stuðlinum í des. leggur Jóhannis nú alla orku í tænastuna fram til apríl. Vit leita eftir bygningi til okkara møtir, so vit kunnu síggjast í samfelagnum her. Biðið eisini fyri flóttafólkatænastuni, har tveir menn og tríggjar kvinnur við muslimskari bakgrund lesa evangeliið saman við toymi okkara. Biðið fyri áhaldni í 2025.

## *22. Leygardagur* *4. Mós. 14.20-45*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**



Tað tykist nærum ógjørligt hjá Benjamin at avgreiða allar arbeiðsuppgávurnar, nú enn eitt starvsfólk er farið. Vit hava júst fingið eitt pinkubarn til fosturs. Biðið fyri okkum.

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

*Í dag fyllir Ewelina Mortensen 15 ár

## *23. Sunnudagur* *Mark. 5.1-20*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**



Samverkafólk okkara á Balabac arbeiða nú fram ímóti at flyta aftur til bygdina, har vit arbeiddu, tá ið vit búðu har. Tað eru uml. 10 ár síðani, at trúboðarar búðu har. Áhugin vísir seg at vera stórur.

## *24. Mánadagur* *4. Mós. 15.1-21*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 8, Jude 6, Evelyn 4, Olivia 1**
Seinastu seks mán. hava vit saman við toymi okkara fyrireikað at fara inn í ein ónáddan ættarbólk í PNG. Men nú er greitt, at hetta er ikki rætta løtan at fara kortini. Vit takka Gudi fyri leiðslu. Biðið, at Harrin vísir, hvar vit skulu virka.

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 16, Noah 15, Karis 11, Judah 9, Ethan 6**

## *25. Týsdagur* *Mark. 5.21-43*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Umsetingarráðgevin rættlesur 1. Sám. frá miðjum feb. og kanska eisini fyrstu 12 kap. av 2. Sám. Eg haldi fram at dagføra NT og gjøgnumgangi ymiskt í GT fyri unga umsetaranum. Harrin hevur nú tikið trúgvandi málhjálparan heim til sín. Eg royni at hjálpa lítlari gentu, ið er ógvuliga sjúk. Biðið fyri henni og fyri virksemi okkara sum heild, at Harrin gevur vísdóm og áhaldni.

## *26. Mikudagur* *4. Mós. 15.22-41*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 15**
Í jan. vóru vit familjan fimm dagar har suðuri í Senegal og brúktu høvið at hvíla. Endamálið var at meta um málførleikan hjá einum

av okkara trúboðarum. Hetta gekk væl. Fimm av teimum seks senegalesisku starvsfólkum okkara á høvuðsskrivstovuni eru ikki trúgvandi. Tey hava arbeitt fyri okkum í mong ár og hava hoyrt evangeliið. Biðið um eitt gjøgnumbrot. Ryan er aftur farin í skúla. Biðið, at hann veksur í trúnni, og at hann framhaldandi er til signing fyri næmingar og lærarar.

*Í dag fyllir Selah Rose Hansen 2 ár

## *27. Hósdagur* *Mark. 6.1-29*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**



Árliga trúboðaratiltakið verður síðst í feb. Minnist øll tey, sum koma. Fleiri ferðast langa leið til hetta. Vit vilja virka fyri, at tey verða uppbygd bæði andaliga og tímiliga, meðan vit eru góð við tey í 10 dagar.

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**



## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!




Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo

| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.


VIT SÓKNAST EFTIR:
Yvirmonnum
Er hetta nakað fyri teg?
OM sóknast eftir yvirmonnum til bæði brúnna og maskinuna til at vera partur av altjóða skipatænastuni. Við at nýta tína útbúgving og førleikar umborð hjá okkum, fært tú høvi at ávirka komandi ættarliðið og ger lívsbroytandi tænastuna hjá skipum okkara møguliga.
Lat Gud brúka teg, meðan tú tænir umboð á *Logos Hope* ella *Doulos Hope*.
TÚ HEVUR LONGU TAÐ, SUM SKAL TIL.
LOGOS HOPE
KOM SUM TÚ ERT
LES MEIRI Á
om.org/ships